

Barack Obama forseti. Mynd: Hvítu Húsini/Pete Souza

# Obama vil leita eftir olju í Atlantshavinum

**Jógvan Hugo Gardar**

28.01.2015 - 09:20

Oljan.fo

Mánadagin kunngjørdi amerikanski forsetin, Barack Obama, at stór økir í Alaska skulu friðast fyri oljuleiting. Í gjár kom hann við boðum um at leitast skal eftir olju fram við eysturstrondini í staðin.

Amerikanska innlendismálaráðið kunngjørdi í gjár ætlanir um at lata upp leitiøkir Í Atlanshavinum frá Virginia til Georgia.

Í einum boðum frá Hvítu húsinum verður sagt at atlit skulu takast til hvørji krøv sum skulu galda fyri hvørt øki sær.

Sambært Hvítu húsunum merkir tað at umleið 80 prosent av økjunum har olja er funnin, og har tað er tøkniliga møguligt at fara eftir oljuni, so skal borast eftir oljuni. Hetta merkir eisini at tey økini sum krevja serliga vernd, hóast olja er funnin, tey skulu friðast.